## Matiné í Hoyvíkar kirkju



Leygardagin 8. november klokkan 12 verður matiné í Hoyvíkar kirkju við tónleikarunum Sámal Petersen, violin og Ragnar Olsen á guitar. Sámal Petersen er kendur sum konsertmeisteri í Føroya Symfoniorkestri. Hann er limur í Aldubáruni og lærari í Føroya Musikkskúla. Útbúgvingina fekk hann á Odense Konservatorium. Ragnar Olsen hevur útbúgving á Esbjerg Konservatorium og er lærari í Føroya Musikkskúla. Hann hevur m.a. verið solistur á guitar saman við Føroya Symfoniorkestri. Á matine-ini fara vit at lurta eftir klassikum tónleiki av J.S. Bach, Roncalli, Scarlatti, Gaspar Sanz og Jørgen Jersild. Ókeypis atgongd. Bussur nr. 3 koyrir úr Steinatúni kl. 11.15.



*Vánaliga fíggjarstøðan tvingar kommununa at fremja stórar sparingar*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

boðini so virðiliga, sum yvirhøvur gjørligt, og eg haldi, at tey dugdu óføra væl at taka tey.

Borgarstjórin sigur, at kommunan eisini hevði syrgt fyri, at fólk høvdu høvi at fáa sálarhjálp, um onkur ynskti tað.

- Vit høvdu ikki sálarfrøðing við á fundunum, men fólk fingu at vita, at høvið var til tess – og hetta høvi stendur framvegis við, leggur hann aftrat.

### Eingin farin

Starvsfólkini, sum fingu ætlanarskriv frá Klaksvíkar kommunu í gjár, hava nú 14 dagar til at gera sínar viðmerkingar, og tá henda tíðin er farin, kemur málið fyri aftur í fíggjarnevndini og at enda á býráðsfundi.

- Onkur heldur kanska, at vit nú hava koyrt meginpartin av fólkinum, sum hevur starvast hjá kommununi, til hús, men soleiðis er tað ikki. Enn er eingin farin heim, sigur Steinbjørn Ó. Jacobsen, borgarstjóri.

# Vit eiga at skipa eitt norðurlendskt OPEC

**Johan Mortensen, vinnulívsmaður, er avgjørdur, tá hann sigur, at íslendingar eins og føroyingar og norðmenn eiga at halda seg langt burtur frá ES. - Sjálvandi hava vit brúk fyri ES, tá hetta er størsti marknaður í Evropa. Vit hava eisini brúk fyri góðum marknaðaravtalum við felagsskapin. Men at hugsa um limaskap, er eftir mínum tykki ørvitisskapur, sigur hann**

SAMSTARV
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Johan Mortensen, vinnulívsmaður, er sannførdur um, at grønlendingar, íslendingar, føroyingar og norðmenn eiga at seta seg niður at tosa í álvara um at skipa eitt norðurlendskt OPEC, sum vit kenna tað innan samstarv um olju.

- Nú íslendska samfelagið er í svárari fíggjarligari kreppu, eiga vit ikki taka tað fyri meira enn tað er, at ein veksandi partur av íslendska fólkinum eftir kanningum at døma er fyri limaskapi í ES. Íslendingar eru óførir og dugnaligir, og teir fara at vinna á kreppuni, áðrenn langt um leingi. Alt tað, sum íslendingar hava skapt í landinum og uttanlands, er eftir mínum tykki heilt fantastiskt. Eg ivist onga løtu í, at stór virðir fara at liggja eftir í landinum, sum ongan veg eru farin, tá Ísland hevur riðið kreppuna av sær aftur.

### Ørvitisskapur

Vinnulívsmaðurin heldur, at tosið í Íslandi um ES-limaskap náttúrliga er panikkent, sum hann tekur til.

- Hetta er ivaleyst ein náttúrlig reaktión, men skjótt munnu íslendingar fara at síggja í eyuni, at glottar eru, og at ES einki er fyri íslendsku tjóðina.

Johan Mortensen er avgjørdur, tá hann sigur, at íslendingar eins og føroyingar og norðmenn eiga at halda seg langt burtur frá ES.

- Sjálvandi hava vit brúk fyri ES sum marknaðarlandi, tá hetta er størsti marknaður í Evropa og soleiðis eisini okkara høvuðsmarknaður. Vit hava eisini brúk fyri góðum marknaðaravtalum við felagsskapin. Men at hugsa um limaskap, er eftir mínum tykki ørvitisskapur.

Vinnulívsmaðurin leggur dent á, at ES so sanniliga eisini hevur brúk fyri londunum í útnorði, sum ráða yvir stóra spísikamarinum her norðuri.

- Mítt uppskot og mín dreymur er, at londini í útnorði ongantíð ov skjótt taka seg saman og skipa eitt norðurlendskt OPEC. Á henda hátt høvdu vit staðið rættiliga sterk, tí vit sita á einum stórum tilfeingi, sum Evropa hevur brúk fyri.



*- Vit eiga at samstarva nógv betri, enn vit gera í dag, og kunnu vit finna saman, standa vit sterk og vinna sømdir, sum vit ikki kenna í dag, sigur Johan Mortensen*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

### Landbúnaðurin

Vinnulívsmaðurin vísir á, at innan fiskaútflutning hava vit nøktandi avtalur við ES, soleiðis at vit kunnu selja okkara fiskavørur undir líkinda treytum.

- Men innan landbúnaðin eru stórir vantar í samhandlinum millum ES og Føroyar. Her hava vit latið upp fyri øllum vørum til Føroya, sum floyma inn yvir okkum, samstundis sum vit ikki kunnu selja so mikið sum ein føroyskan mjólkarpakka til ES. Vit hava lagt okkara heimamarknað víðopnan fyri ES, har at kalla einki eftirlit er við nøkrum, samstundis føroyskar vørur ikki sleppa inn á teirra marknað.

Johan Mortensen vísir á, at seinasta dømi um, at føroysk framleiðsla líður undir hesum, er eggvirkið á Velbastað, sum herfyri noyddist at lata aftur.

- Úrslitið av, at føroyski marknaðurin liggur so víðopin og uttan nevnivert eftirlit, er, at vit hava havt fleiri salmonella tilburðir. Danir sendu tískil eina nevnd til Føroya at kanna, hvaðani salmonellan kemur. Tú kanst eta, hvat tú vilt – bara vøran kemur úr ES, men nóg góð trygd er ikki fyri, at vøran er í lagi, leggur hann aftrat.

Vinnulívsmaðurin skjýtir tí upp, at nýggja landsstýrið skjótast gjørligt fer at biðja um samráðingar við ES um landbúnaðarvørur.

- Hesar samráðingar mugu soleiðis eisini byggja á, at Føroyar fáa í lag betri avtalur innan landbúnaðarvørur, leggur hann aftrat.

Hann vísir á, at meðan onnur lond samráða seg fram til avtalur, har ein ávís verja er av vørum, sum heimamarknaðurin framleiðir, lyfta vit í Føroyum ikki hond frá síðu fyri at verja okkara lokala marknað.

- Á hesum øki eru vit illa stødd í samhandlinum við ES, sigur vinnulívsmaðurin.

### Annað samstarv

Johan Mortensen heldur, at londini í útnorði ikki bert eiga at samstarva um fiskatilfeingið, men so sanniliga eisini um eitt nú ferðamannavinnu, grøna orku og olju.

- Vit eiga at samstarva nógv betri, enn vit gera í dag, og kunnu vit finna saman, standa vit sterk og kunnu vinna sømdir, sum vit ikki kenna í dag. Vit sita á so nógvum tilfeingi her í Norðuratlantshavi, at Grønland, Ísland, Føroyar og Noregi slett ikki hava brúk fyri at fara upp í ein felagsskap sum ES, ið samstundis tekur ein stóran part av sjálvræðinum frá okkum.

Hann vísir á, at hesi lond eisini hava eitt stórt og gott søluapparat, tá ræður um fiskavørur.

- Málið hjá okkum er at finna eitt felags stev og finna saman. Fíggjarkreppan kemur at regionalisera lond, og vit fara at síggja eina minni globalisering, enn vit hava gjørt. Tjóðskaparkenslan í fólkinum fer aftur at veksa, men lond fara at samstarva betur, sigur Johan Mortensen.